Ítróttar
Sosialurin
Nr. 107 • mikudagur • 7. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# ÍSF hóttir Kringvarpið við endurgjaldskravi

**Ítróttarsamband Føroya hóttir nú Kringvarpið við at strika sáttmálan millum partarnar um dekning av føroyskum ítrótti. ÍSF heldur, at Kringvarpið misrøkir avtaluna millum partarnar, og møguligt endurgjaldskrav kann koma upp á tal**



*ÍSF og FSF nokta at bakka fyri kravboðunum úr Kringvarpinum. Verður málið lagt fyri gerðarætt krevur ÍSF, at sáttmálin verður settur úr gildi*

ÓSEMJA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ítróttarsamband Føroya ætlar ikki at bakka fyri Kringvarpinum, og kemur tað til skarpskeringar, ætlar ÍSF at fáa sáttmálan millum partarnar strikaðan og møguliga krevja endurgjald frá Kringvarpinum fyri mishald.

Tað eru boðini í brævinum, sum ÍSF sendi Kringvarpinum í gjár.

Ósemja er um, hvussu upptøkur av samrøðum í sambandi við dystirnar í Formuladeildini skulu gerast. Sjónvarpið vil ikki binda seg til at gera hesar frammanfyri einum serligum lýsingarveggi hjá feløgunum, meðan Fótbólssambandið í sínum orðaðu mannagongdum vil hava samrøðurnar gjørdar við hesar lýsingaveggir.

Sáttmálin millum ÍSF og Kringvarpið er ikki greitt orðaður viðvíkandi hesum, og tí er nú so stór ósemja um hetta mál, at Sjónvarpið er givið at senda føroyskan fótbólt. Kringvarpið kravdi í síðstu viku, at FSF tekur sína reglugerð um upptøkur av dystunum aftur ella verður málið lagt fyri ein gerðarætt at taka støðu til.

### ÍSF stendur fast

Ítróttarsamband Føroyar svaraði í gjár kravinum frá Kringvarpinum, og har ger ÍSF greitt, at tað fer ikki at biðja FSF taka teirra reglugerð aftur. Sambært ÍSF kann FSF gera júst slíkar mannagongdir sambært sáttmálanum, meðan Kringvarpið ikki hevur hildið sín part av avtaluni.

Skrivið frá ÍSF endar rættiliga hvassorðað, tí ÍSF nevnir møguleikan at krevja sáttmála millum partarnar strikaðan vegna mishald. Harafturat kann tað koma upp á tal, at ÍSF fer at krevja endurgjald frá Kringvarpinum fyri hetta mishald av sáttmálanum, skrivar advokaturin Christian Andreasen í brævinum, sum hann hevur sent vegna ÍSF.

FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






*Hvar er bólturin?*

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.